Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

# Dátuverndarkunning og kunning um nýtslu av farsporum á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya

## Dátuverndarkunning

Endamálið við hesi kunning, er at lýsa, hvussu Landsbanki Føroya savnar og viðger tínar persónupplýsingar, umframt hvussu Landsbanki Føroya verjir hesar upplýsingar, og hvussu tú kanst fremja tíni lógarásettu rættindi, sambært dátuverndarlógini, sum bleiv sett í gildi 1. januar 2021. Landsbankin tekur øll fyrivarni fyri at verja tínar persónupplýsingar sambært galdandi lóggávu.

### Heimasíðan

Tá tú ferðast á okkara heimasíðu, savna vit upplýsingar um tína tóleind (teldu/teldil/snildfon). Hesar upplýsingar fevna um:

1. Hvørjar cookies verða goymdar
2. Slag av tóleind
3. Slag av kaga (browser)
4. Tíðarsonu
5. IP-adressu
6. Hvørjar síður, tú vitjar
7. Hvussu tú fanst fram til okkara heimasíðu

Tøknin, vit nýta til innsavnan, er farspor (cookies), sum eru eru dátufílar, sum verða goymdar á tíni tóleind.

Tað er ikki gjørligt at nýta hesir upplýsingarnar til at avdúka hvørki navn ella adressuna hjá tær.

Vit brúka upplýsingar, ið vit savna inn um tóleindir o.a., til at halda eyga við møguligum álopum á heimasíðuna. Vit brúka eisini hesar upplýsingar til at gera heimasíðu okkara betri, og harvið geva tær eina betri uppliving.

Í sambandi við møgulig marknaðarátøk kunnu vit brúka upplýsingar um tóleindina fyri at betra, avmarka og tillaga samskiftið, so at tað er so greitt og viðkomandi sum gjørligt.

Endamálið við at savna og viðgera tínar persónsupplýsingar er at tryggja og betra um heimasíðuna og aðrar útgávur hjá Landsbankanum.

Viðgerðin av upplýsingunum er neyðug fyri at røkja okkara myndugleikaútinnan (Dátuverndarlógin, grein 8, stk. 1, litra 5).


Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Upplýsingarnar verða goymdar í 5 ár eftir lokna viðgerð og vera síðani strikaðar.

**Tíðindi á heimasíðuni**
Tá ið tú meldar teg til tíðindabrævið hjá Landsbanka Føroya, viðger Landsbanki Føroya tær upplýsingar tú hevur upplýst. Í hesum førum er talan bert um tína teldupost adressu.

Endamálið er at senda tær tíðindini, sum Landsbanki Føroya gevur út.

Bert einstøk starvsfólk í Landsbanka Føroya hava atgongd til listan av teldupost adressum. Hetta, fyri at Landsbanki Føroya kann halda skil á einum dagførdum lista av móttakarum og fyri at kunna hjálpa brúkarum, ið renna seg í trupulleikar við at avmelda tíðindabrævið. Upplýsingar um tilmeldingar verða ikki latnar víðari til triðja part.

Viðgerðin av upplýsingunum tú hevur givið Landsbanka Føroya, fer fram við tínum samtykki, tá tú meldar teg til at móttaka tíðindi frá Landsbanka Føroya (Dátuverndarlógin, grein 8, stk. 1, litra 1). Tú kanst til eina og hvørja tíð taka samtykkið aftur við at melda tíðindabrævið frá. Hetta kann gerast við at fylgja eini leinkju niðast í teldupostinum.

Landsbanki Føroya viðgerð tínar upplýsingar til tú meldar frá tíðindunum. Síðani verða upplýsingarnar hjá tær strikaðar.

Persónsupplýsingarnar verða innsavnaðar beinleiðis frá tær.

**Samskifti við Landsbanka Føroya**
Um tú setur teg í samband við Landsbanka Føroya, viðger Landsbanki Føroya upplýsingar um navn títt, telefonnummar, teldupost adressu og møguliga starvsstað.

Endamálið við at viðgera upplýsingarnar er, at geva Landsbanka Føroya møguleika at samskifta við teg og svara møguligum spurningum.

Viðgerðin av upplýsingunum er neyðug fyri at røkja okkara myndugleikaútinnan (Dátuverndarlógin, grein 8, stk. 1, litra 5).

Persónsupplýsingarnar verða innsavnaðar beinleiðis frá tær.

**Veitarar og samskiftisfelagar**
Um tú ert sett(ur) hjá einum veitara ella samstarvsfelaga hjá Landsbanka Føroya, viðger Landsbanki Føroya persónsupplýsingar hjá tær, so sum navn, teldupost adressu, telefonnummar og starvsstað.



Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Endamálið er at kunna samskifta við teg um samstarvið.

Viðgerðin av upplýsingunum er neyðug fyri at røkja okkara myndugleikaútinnan (Dátuverndarlógin, grein 8, stk. 1, litra 5).

Landsbanki Føroya viðger tínar persónsupplýsingar so leingi samstarvið heldur á.

Persónsupplýsingarnar verða savnaðar beinleiðis frá tær ella frá arbeiðsgevara tínum.

**Starvsumsóknir**
Um tú søkir starv hjá Landsbanka Føroya, viðger Landsbanki Føroya persónsupplýsingar hjá tær, sum tú upplýsir í umsóknini hjá tær. Endamálið er at viðgera umsóknina sjálva.

Viðgerðin av teimum upplýsingum tú hevur latið Landsbanka Føroya, fer fram við tínum samtykki, tá tú sendir umsóknina til Landsbanka Føroya (Dátuverndarlógin, grein 8, stk. 1, litra 1). Tú kann til eina og hvørja tíð taka samtykkið aftur við at boða Landsbanka Føroya frá. Hetta kann gerast við at skriva til landsbankin@landsbankin.fo ella beinleiðis til okkara dátuverndarfólk kda@faroelaw.fo.

Um tú ikki verður sett(ur) í Landsbanka Føroya verður tín umsókn strikað eitt ár eftir at Landsbanki Føroya hevur móttikið hana. Tú kanst eisini sjálv(ur) biðja Landsbanki Føroya um at goyma umsóknina longri, um tað hevur áhuga. Verður tú hinvegin sett(ur) í starv í Landsbanka Føroya, fylgjur umsóknin hjá tær við í tínum starvsfólkaviðurskiftum.

Persónsupplýsingarnar verða innsavnaðar beinleiðis frá tær.

**Víðarilatan av persónsdátum**
Vit viðgera tínar persónsdátur í trúnaði og deila vanliga ikki tínar persónupplýsingar við triðjapartar. Hetta kann tó koma fyri seg í ávísum førum. Hetta kann vera við aðrar almennar myndugleikar, tá hetta er álagt okkum í galdandi lóggávu, ella við uttanhýsis samstarvspartar, um vit hava títt samtykki, ella vit hava ein lógarásettan rætt til tess.

**KT**
Vit nýta eina røð av KT-tænastum og -skipanum. Í fleiri av hesum skipanum viðgera vit persónupplýsingar.

Summar av hesum skipanum verða hýstar lokalt, ímeðan aðrar verða hýstar hjá veitaranum ella í cloudloysnum. Vit tryggja okkum, at tíni rættindi eru vard, og at trygdarstøðið verður varðveitt í sambandi við slíkar dátuflytingar.


Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

**Útflýggjan av tínum upplýsingum**
Fyri at tryggja og betra um heimasíðuna hjá Landsbanka Føroya, verða tínar upplýsingar deildar við hesum uttanhýsistænastum:

- Dynamicweb – fyri at kunna spora og forða fyri møguligum álopum frá teldusníkum og fyri støðugt at betra um virkisførið á heimasíðuni.
- Google Analytics – fyri at síggja, hvussu tú brúkar síðuna, og betra um upplivingina.

## Kunning um nýtslu av farsporum (cookies)

**Hvat eru farspor?**
Farspor eru smáar tekstfílur, sum verða goymdar av tínum kaga (browsara) á tínari teldu, snildfon ella tilsvarandi við tí endamáli, at kenna aftur, minnast stillingar, gera hagfrøði, og málrætta lýsingar. Farspor merkir í hesi kunning og í samtykkinum eisini aðrar hættir fyri sjálvvirknari dátuinnsavnan, sum t.d. Flash-cookies (Local Shared Objects), Web Storage (HTML5), Javascripts ella farspor, ið verða sett við nýtslu av øðrum ritbúnaði. ”Farspor” fevnir eisini um upplýsingar um MAC-adressu og aðrar upplýsingar um tína tóleind.

Farspor kunnu verða nýtt av Landsbankanum og av triðjapørtum.

Grundleggjandi eru tvey sløg av farsporum: fyribils og verandi. Fyribils farspor er knýtt at tí aktuellu vitjanini og verða strikaðar sjálvvirkandi tá ið tú sløkkir kagan. Verandi farspor verða ikki strikað, tí tey hava serliga funktión, til dømis farspor, sum goyma frávalstillingar. Tú kanst strika ávísar ella øll farspor, sum tín kagi hevur goymt umvegis stillingarnar á kaganum.

**Samtykki**
Við at brúka okkara heimasíðu og trýsta ”Eg góðtaki” á okkara fráboðan um farspor á heimasíðuni, gevur tú samtykki til at Landsbankin kann nýta farspor, sum lýst omanfyri. Tú kanst afturkalla ella broyta títt samtykki við at broyta stillingarnar í yvirlitinum, eins og tú kanst forða farsporum í tínum kaga.

**Hvussu sleppur tú undan og strikar tú farspor?**
Um tú ikki vilt hava, at heimasíða Landsbankans leggur farspor á tína tóleind, so kanst tú altíð afturkalla ella broyta títt samtykki við at broyta stillingarnar í yvirlitinum, eins og tú kanst forða fyri farsporum í tínum kaga. Hvussu tú forðar fyri farsporum valdast hvønn kaga tú nýtir. Um tú nýtir fleiri ymiskar kagar, so skalt tú afturkalla ella broyta títt samtykki í øllum kagum ella forða fyri farsporum í øllum kagum. Um tú afturkallar samtykkið, strikar ella forðar fyri farsporum, kann tað henda, at heimasíðan ikki virkar 100% optimalt, og at tú ikki fært atgongd til ávíst innihald.


Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir